DAGSINS MEINING

Góð ráð harra Løgmaður

Partarnir á arbeiðsmarknaðinum og ikki minst semingsmenninir hava víst í verki, at teir ikki megna at liva upp til ta ábyrgd, ið áliggur teimum. Tað líkist heilt einfalt ongum, at partarnir ikki liggja vannrættir í luftini dag og nátt og royna at finna eina semju. Ístaðin fyri ganga dagar og vikur ímilllum, at samband er, meðan partarnir fylla heimasíður við skotum eftir hvørjum øðrum, t.d. um at onkur einstaklingur hevur fylt bensin á bilin hjá sær. Hetta er barnsligt og tænir ikki nøkrum endamáli.

Báðir partar eiga at endurskoða sín samráðingarteknikk og eiga harafturat at meta um, um fólkini, ið leiða samráðingarnar yvirhøvur duga at samráðast. Kanska onkur gerst firtin av hesum orðum, men borgarin sær so einki prógv fyri samráðingarsnildi.

Var tað ikki eisini uppá sítt pláss, at semingsmenninir stungu í sekkin, tá teir nú hava givið skarvin yvir? Hava teir ikki fullkomiliga misskilt sína uppgávu!

Kann Føroya Landsstýri loyva sær at sita og hyggja at, meðan eitt nú ferðavinnan, ið er ein av nýggju vinnunum í Føroyum, svíður? Kann Føroya Landsstýri loyva sær bert at hyggja at, meðan føroyska ryktið verður til einkis uttanfyri landoddarnar?

Gamaní eru tað partarnir á arbeiðsmarknaðinum, ið fyrst og fremst eiga ábyrgdina av syndarligu støðuni, men Føroya Landsstýri kann ikki siga seg frítt fyri at hava lagt grundina til støðuna við sínum politikki. Undir øllum umstøðum eigur Føroya Landsstýri trupulleikan nú, eftirsum Semingsstovnurin ikki riggar, og partarnir á arbeiðsmarknaðinum ikki tosa saman. Hetta kann løgmaður ikki skákað sær undan.

Løgmaður átti at givið þørtunum á arbeiðs-marknaðinum ein uppsang fyri at ganga og søpla tíðina burtur í vikuvís uttan konstruktivar samráðingar. Harnæst eigur løgmaður at geva Fíggjarmálaráðharranum boð um at virða SEV sáttmálan, tí ein undirskrivað avtala er ein avtala. At SEV so ikki hevði sítt hús í ordan, tá teir undirskrivaðu við Maskinmeistarafelagið, er harmiligt og eigur at fáa avleiðingar. Tó er hetta ein spurningur millum SEV og Fíggjarmálastýrið og hevur einki við Maskinmeistarafelagið at gera, ið hevur undirskrivað ein nýggjan lønarsáttmála í góðari trúgv. Løgmaður má síðani fáa Bjarna Djurholm til at endurskoða semingsstovnin.

Síðst men ikki minst eigur Føroya Landsstýri at leggja uppskot fyri Tingið um, at landið eins og fyrr betalir fyrsta sjúkradag. Hetta ynskja báðir partar á arbeiðsmarknaðinum, og óivað hevði hetta gjørt, at arbeiðsgevarnir høvdu havt ráð at gingið krøvunum um fýra krónur um tíman pluss eitt hálvt prosent afturat í eftirløn á møti. Soleiðis høvdu øll kunnað verið glað, uttan sjálvandi Fíggjarmálaráðharrin, ið hevði verið noyddur at funnið 8 til 10 milliónir á Fíggjarlógini. Hetta kundi hóskandi verið spart í almennari umsiting, har 8 millónir eru smápengar.

Sosialurin

VIÐMERKINGAR

Verkfalshugleiðingar

Hans J. Hermansen

Hvørt ár halda vit páskir, hvítusunnu, stevnur av ymiskum slagi og jól. Og annað hvørt ár leggja vit arbeiðið niður. Soleiðis er lívið í Føroyum. Alt vendir javnan aftur. Tað er sum við sjóvarfallinum.

Hví man tilveran hava lagað seg soleiðis her hjá okkum? Hví munnu vit leggja arbeiðið niður so at siga fast annað hvørt ár, tá ið sáttmálasamráðingarnar standa í botni? Her er eitt hvørt rúkandi galið, og hetta er ein torskildur spurningur, sum fleiri mugu taka ábyrgdina av.

Politikkarin er óivað tann, sum má átaka sær stóra ábyrgd av, at støðan er, sum hon er. Hóast nakað er fráliðið, hevur borgarin ikki gloymt, hvussu løgtingsmenn uttan himpr ásettu og øktu sína egnu løn. Meinigi maðurin hevur ilt við at skilja tílíka avgerð, tí tað líkist mest einum kvetti, har politikkarin hevur brúkt fólkaræðið til at geva sær sjálvum loyvi til at fara eftir skattaborgarans peningi til egið gagns. Allar løgtings- og landsstýrimannalønir og eftirlønir teirra áttu at verið ásettar av óheftum fólki og við støði í føroyskum lønarviðurskiftum og -politikki.

Og so hesi ótolandi verkføllini, sum skaða meiri enn tey gagna: Tey skaða samfelagið sum heild, tey skaða arbeiðspláss, tey skaða vinnulívið, ferðavinnuna, men tey raka harðast tann, tey skuldu gagnað, nevniliga arbeiðstakaran sjálvan. Annað hvørt ár fer stórur partur av frítíð og frítíðarløn til at gjalda verkfall, sum næstan bara gagnar fakfelagsleiðarum. Alibiið til at vera afturvaldur sum leiðari liggur í, at tú hevur øst fólk upp í nøkrum, sum líkist einum arbeiðaraverkfalli. Men tað er langt millum lønirnar hjá tímaløntum og tær hjá nógvum av leiðarum teirra. Hetta er tekin um ábyrgdarloysi, og tað er eisini tekin um dugnaloysi. Um allar trætur skulu avgerast við glíming, til annar liggur eftir á, snýr tað seg bara um veruleikafjart undirhald. Tað hevur als einki við kor verkamanna at gera. Tað átti at verið gjørligt at loyst lønartrætur á annan hátt enn við verkfalli, men viljin tykist ikki vera til staðar til tess. Og so er alibiið fyri at vera afturvaldur sum fakfelagsleiðari eftir øllum at døma eisini burtur.

Men løgið er, at eingin er, sum mælir ímóti hesum vitloysi, tí stórur partur av verkamannafjøldini kennir sannleikan. Er eingin so frægur, at hon ella hann dittar sær at krevja, at demokratisk viðurskifti galda eisini fyri fakfelagspolitikk? Ella hvussu leingi ætla tey tímaløntu blint at fylgja teimum, sum annað hvørt ár noyða tey út í arbeiðsloysi móti teirra vilja, bara fyri at fáa eina fjøður í sín egna hatt? Yrkingin hjá Rasmussi Effersøe "Fast stóð í fonnum…" lýsir verandi støðu væl, um vit bara fylgja slóðaranum, ið dugir ikki at nýta vit og skil. Vónandi vaknar arbeiðararørslan skjótt og sær, hvat gongur fyri sig. Nógv er, ið kann og skal fáast upp á pláss, uttan at ein skal berjast annað hvørt ár bara fyri at vinna tað mista innaftur. Alt annað eru bara tóm orð.

Tað er sera óheppið, at semingsstovnurin tykist vilja fara aftan fyri bakið á fakfelagsleiðsluni við at mæla til eina uratkvøðu um semingsuppskotið, tí tað var tað ikki búgvið til enn, og tað østi eisini verkamannafeløgini óneyðugt.

Tíverri sær út til, at tá ið fólk fær vald, broytast tey, so at heilin tóðnar og kroppurin bólgnar. Allar ósemjur skulu avgerast við einum glantrileiki, har lítið og einki hendir í veruleikanum til gagns fyri tann, tað skuldi gagnað. Seinasta útspælið við at taka flestu undantaksloyvi aftur minnir mest um máttloysi einans við einum endamáli: at fáa løgtingið at leggja uppí. Og tá er alt stríðið til fánýtis.

Tá ið hetta stríðið er av, er nógv, sum skal rættast uppaftur, bæði fakfelagspolitiskt og landspolitiskt, men fyrsta stigið er at fáa enda á verkfallinum. Tað gerst bara við nýggjum hugburði, tí so at siga øll, tú tosar við, eru samd um, at tíðin er farin frá ábyrgdarleysum verkføllum, ið bara gagna nøkrum heilt fáum. Fyrr enn tað er hent, fara ósemjur frameftir at vera merktar av ábyrgdarloysi, vónloysi, máttloysi, lógloysi og dugnaloysi. Tað átti at verið gjørligt at brúkt vit og skil eisini. Antin mugu leiðslurnar taka annað skinn um bak ella lata onnur við viti og hegni sleppa framat. Sum er, gongur verkamannafjøldin eitt stig fram og tvey eftir hæli.

Fingu kravboð frá arbeiðsgevarunum

Fakfeløgini í verkfalli

Partarnir á privata arbeiðsmarknaðinum hittust týsdagin 3/6/2003 til fundar um støðuna, nú verkfall/verkbann hevur staðið við í vikuvís.

Arbeiðarafeløgini í verkfalli hava víst vilja til at fáa enda á verkfallinum og hava víst samfelagssinni, tað prógva t.d. tey mongu undantøkini, sum givin eru, áðrenn arbeiðsgevararnir tóku leiklutin sum teir ráðandi hesum viðvíkjandi. Tá løgdu teir t.d. Smyril eitt tíðarskeið.

Arbeiðarafeløgini hava slakað heilt nógv í sínum krøvum hesar farnu vikurnar. Frá 25 krónum í tvey ár, varð farið niður á 16,48 krónur. Síðani niður á 14 krónur, síðani 12 krónur, 10 krónur. At enda 8 krónur (í tvey ár) og so ávíst eftirlønarprosent.

Arbeiðsgevarar løgdu út við 3,20 krónum.

Á fundinum týsdagin var greiða støða teirra, at talan kundi gerast um 4 krónur, hvørki meira ella minni. So arbeiðsgevararnir hava hinvegin ikki flutt seg langt hesar vikurnar.

Arbeiðarafeløgini gingu við til tær 4 krónurnar um árið, men hildu fast við kravið um eitt ávíst eftirlønarprosent. Men eisini her slakaðu arbeiðarafeløgini, frá einum prosenti niður í 0,8 prosent og niður í 0,5 prosent. Men uttan úrslit.

Framhald á næstu síðu

Sosialurin

Sosialurin
Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Jan Müller
jan@sosialurin.fo
Blaðstjóri: Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
Fíggjarleiðari: Jákup Mørk
jakup@sosialurin.fo

Marknaðardeild: lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad
finnbjorg@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo

Blaðfólk:
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo
Ingrid Bjarnastein ingrid@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
Ingi Rasmussen ingi@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo

Ítróttur:
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

Myndamenn:
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

Sosialurin í Norðoyggjum:
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
Sosialurin í Suðuroy:
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo
Sosialurin í Eysturoy:
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 225429
e-post: vilmund@sosialurin.fo
Sosialurin í Vágum:
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

Uppseting/prent:
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
Útgevari:
Sp/f Sosialurin
Avgreiðsla:
Mán.-fri. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
Postadressa:
Postboks 76, 110 Tórshavn
E-mail:
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14^{00}

Lýsingar

Freistir:	Tekstlýsingar	Størri lýsingar	Lýsingartorgið	Heilsanir
Týsdagsblaðið	Mán.kl. 10	Frí. kl. 15	Frí. kl. 12	Frí. kl. 12
Mikudagsblaðið	Týs. kl. 10	Mán. kl. 15	Mán. kl. 12	Mán. kl. 12
Hósdagsblaðið	Mik. kl. 10	Týs. kl. 15	Týs. kl. 12	Týs. kl. 12
Fríggjadagsblaðið	Hós. kl. 10	Mik. kl. 15	Mik. kl. 12	Mik. kl. 12
Leygardagsblaðið	Frí. kl. 10	Hós. kl. 15	Hós. kl. 12	Hós. kl. 12

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

Stødd:
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

Innsent tilfar
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.

Ruðuleiki á arbeiðsmarknaðinum

Bjørn á Heygum

Avoldað valdsuppgerð
Heimsmet í verkføllum - Landið lagt lamið reguliga á nærum hvørjum ári - blokadur - boykott - samhugatiltøk - ólag á samferðsluni - ongin undirvísing - vantandi tíðindaflutningur - ongin vaktar- og bjargingartænasta, - og soleiðis kann haldast fram, hetta er dagligdagurin í Føroyum.

Øll eru samd um at henda støða er fullkomuliga og aldeilis óhaldbar og at onki framkomið samfelag kann liva við einum slíkum afturvendandi ruðuleika hvørt einasta ár og kanska fleiri ferðir árliga.

Henda avoldaða valdsuppgerð og maktdemonstratión millum arbeiðsgevara og arbeiðstakara, sum tíðin langt síðan er farin frá, má fáast í eina aðra meira civiliseraða legu

Skaðarárin, óstabilitetur og oyðileggjandi umdømi av hesum lemjandi verkføllum er undirgravandi fyri búskapin og er vorðin ein álvarsligur samfelagstrupuleiki og ein hóttan móti rættarsamfelagnum og okkara tilverugrundarlag.

Veik politisk skipan
Orsøkin til ruðuleikan í Føroyum skal ivaleyst síggjast í ljósinum av eini sera veikari politiskari skipan samanhildið við eina upparbeidda siðvenju, har partarnir á arbeiðsmarknaðinum nærum eru friðhalgaðir og kunnu hóreiggja sær sum teimum lystir.

Útgangsstøði er sjálvsagt, at ongin kann taka rættin frá einum arbeiðstakara at leggja frá sær arbeiði, ella hjá arbeiðsgeva at taka ímóti eini slíkari tænastu, tá sáttmálaloysi er millum partarnar.

Tá slíkt hendir er ein tó noyddur at taka neyðug samfelagsfyrilit, soleiðis at lív, heilsa og vítttfevnandi samfelagsvirði ikki fara fyri skeyti.

Tá partarnir á arbeiðsmarknaðinum ikki duga sær hógv og kenna síni mørk við tí úrslitið at trygd og tilverugrundarlagið hjá einstaka borgaranum kemur í vanda, tá ikki bert eigur, men skal Landsstýrið og Løgting at taka øll neyðug stig til at steðga slíkum samfelagsniðurbrótandi virksemi.

Fyribyrging neyðug
Tað er ei heldur nóg mikið at landsins stjórn og lóggevarar bara sita hendur í favn hvørja ferð og bíða til støðan er vorðin so ótolandi, at slík lógarinntriv gerast neyðug.

Teir hava eina treytaleysa skyldu at forða fyri, at samfelagið ferð eftir ferð skal koma út í slíkt óføri.

Til tess at fyribyrgja hesum anarki er tískil neyðugt at seta nýskipanir í verk, sum kunnu laga reglurnar á arbeiðsmarknaðinum til nútíðarkrøv og treytir, soleiðis at henda kaotiska støða kann fáa ein enda.

Ongin ivi er um, at ein arbeiðsrættur er alneyðugur, soleiðis at tað kann setast skjótt og effektivt inn mótvegis ólógligum tiltøkum frá ávikavist arbeiðsgevara og fakfeløgum. Ongin haldbar grundgeving er enn førd fram um at vit ikki skulu stovnseta arbeiðsrætt uttan bara hesar afturvendandi ákærur, brigsl og hóttanir uttan innihald frá ymsum fakfelagsleiðarum, sum eftir øllum at døma stórtrívast umdir hesum óskipaði viðurskiftum, sum nú valda.

Politikararnir eru nú noyddir at taka sær um reiggj og sýna dirvi, tá hetta hetta eyðkenda feika konfliktskýggjandi støðuloysi mótvegis þørtunum á arbeiðsmarknaðinum bara førir okkum enn longri út í kyksendan..

Boykott av størvum
Tað er eisini týðuligt, at ávís feløg eru farin at spreingja mørk og nú eru gingin ov vítt í teirra "metodum" til tess at vinnu sínum limum teirra "sjálvsøgdu rættindi".

Maskinmeistarafelagið kann sigast at ganga á odda í hesi nýggju herferð við at taka kvørkratak á samfelagið og ikki at skýggja nakrar midlar, um so hetta gongur móti landsins lógum og vælferð.

Tað sigst at teir ikki himprast við at sløkkja fyri elveitingini til alt landi um sáttmálaviðurskiftini mótvegis SEV ikki koma í rættlag. Hetta er ikki verkfall, hetta er í veruleikanum rein sabotga, sum ikki eigur at verða told eitt einasta minut uttan lógarinntriv.

Annað eyðkent dømi er stríðið millum maskinmeistarafelagið og Vaktar- og Bjargingartænastuna, har ávísir limir í felagnum, sum eru tænastumenn, hava sagt upp síni størv kollektivt í samráð við Maskinmeistarafelagið.

Teir krevja nú at vera settir aftur uttan umsókn, samstundis sum Maskinmeistarafelagið boykottar allar nýggjar starvssetanir hjá Vaktar- og Bjargingartænastuni. Hetta ber heilt einfalt ikki til og hetta krav kann og má ikki gangast á møti, tá tað annars vildi verið talan um beinleiðis lógarbrot. So kann maskinmeistarafelagið fáa so nógva undirtøku og samhugafráboðanir frá øðrum fakfeløgum, sum tað vera vil.

Ein tænastumaður sum lógliga hevur sagt seg úr starvi, er farin úr starvi - basta! Tá starvið er leyst, skal tað lýsast alment og kann ein og hvønn søkja samb. § 5 í lógina um tænastumenn. Vaktar- og Bjargingar Tænastan kann og skal tískil ikki gera annað enna tað lógin áleggur teimum og sum stovnurin hevur gjørt, nevniliga at lýsa størvini leys, soleiðis at allir skikkaðir umsøkjarar fáa høvi til at søkja. Vaktar- og Bjargingartænastan kann og skal sostatt ikki ganga krøvunum frá maskinmeistarafelagnum á møti., Eitt krav frá einum fakfelag um at bróta landsins lógir, kann jú ikki koma uppá tal og mugu skipini hjá Vaktar- og Bjargingartænastuni harvið heldur liggja til dómadag, heldur enn eitt slíkt krav verður gingið á møti. Her verður Maskinmeistarafelagið og øll teirra stuðulsfeløg tískil noydd at taka í egnan barm, tá mark skal vera fyri hvat man kann loyva sær av "horriblum" krøvum um ikki rættarsamfelagið skal verða fullkomuliga undirgravað og tileinkisgjørt.

Ólógligar blokadur
Vit uppliva eisini dagliga hesar blokadur av vanligari samferðslu og lógligum ørindum hjá borgarum og stovnum, sum ikki eru fevnd av verkfalli, og sum eftir øllum at døma eru vorðnar stovureinar og góðkendar sum eitt nýtuligt amboð í hesum gamaldags stættarstríðið, sum sýnist at hava so góð gróðrarlíkindi í Føroyum.

Hetta er bara ein óhaldbar støða og ein fullkomin misfatan av galdandi reglum. Skal bara nøkulunda skil valda í hesum landi, eiga hesar blokadur at verða beindar av vegnum á staðnum og uttan nakað himpr yvirhøvur.

Ongn kann liva við at ávísir bólkar í samfelagnum fyri at tæna egnum seráhugamálum á ein slíkan primitivan hátt taka aðrar uttanfyristandandi ósekar samfelagsborgarar sum gíslar í teirra innan-hýsis stríðið, fyri harvið at trumfa sín vilja ígjøgnum.

Tá lógligur postflutningur verður tarnaður og sjálvstøðug vinnurekandi, sum als ikki eru fevnd av verkfallinum, verða forðað í at útinna síni dagligu ørindi uttan at løgreglan kann hjálpa teimum, tá haltar støðufesti hjá avvarðandi myndugleikum og tá er nakað rívandi galið við sjálvum rættar-samfelagnum!

Bæði politikarar og løgregla eiga at gera sær púra greitt at teirra lunkaða og svikaliga støðuloysi á hesum øki ikki kann halda fram. Teir mugu yvirvinna sín "berøringsangst" ella nertingarræðslu fyri þørtunum á arbeiðsmarknaðinum. Tá sjálvt grundleggjandi viði í rættarsamfelagnum eru komin í vanda er stundin komin til handling. Antin seta myndugleikarnir seg í respekt á hesum øki her og nú ella er álvarsligur vandi fyri at hetta samfelagið spakuliga verður undirgravað innanífrá av lógloysi og ruðuleika.

Eitt primitivt eljustrið, har nakrir fakfelagsleiðarar í egnum fullkominleika og uttan ábyrgd fyri lógini ella fyriliti fyri øðrum taka seg sjálvan til rættis, betrar ikki um korini og loysir ongar trupulleikar hjá vanliga løntakaranum í Føroyum.

Ein ávaring á Løgtingið og Landsstýrið

Fakfeløgini í verkfalli

Til

Vinnumálaráðið
Att.: Bjarni Djurholm,
landstýrismaður

Føroya Løgtingið
Att.: Anfinn Kallsberg,
løgmaður
Tórshavn,
hin 3. juni 2003

Soljóðandi skriv hava fakfeløgini í verkfalli sent Bjarna Djurholm, landsstýrismanni í vinnumálum, Anfinni Kallsberg, Løgmanni og øllum teimum politisku flokkunum

Nú frættist at Føroya Arbeiðsgevarafelag hevur heitt á Landsstýrið um at kalla tingið inn, í sambandi við trætuna á privata arbeiðsmarknaðinum.

Hetta merkir, at arbeiðsgevararnir vilja hava at lønin hjá limum okkara verður ásett við lóg.

Vit vilja staðiliga ávara okkara politikarar móti at leggja seg út í trætuna á arbeiðsmarknaðinum.

Um Løgtingið leggur uppí, so er hetta eitt beinleiðis álop á fría samráðingarrætt okkara, og harvið eitt álop á sjálvu demokratisku skipanina her á landi.

Ein uppílegging er eisini tað sama sum at Løgtingið gongur ørindi fyri arbeiðsgevara-partin, og vit skulu boða frá, at tað skal ikki verða gloymt, um okkara politikarar soleiðis stinga verkamannafjøldina í ryggin.

Vit skulu vísa á, at tað ikki er fakfeløgini sum hava forðað fyri at semja kundi fáast í lag um lønina, tí undirritaðu feløg hava slakað í lønarkrøvum okkara frá kr. 12,60 pr. ár niður í kr. 8,24 pr. ár, og síðani aftur bæði niður í kr. 7,00, kr. 6,00 og 5,00 pr. ár.

Hinvegin hevur Føroya Arbeiðsgevarafelag bert førkað seg frá kr. 2,00 pr. ár upp til kr. 3,70 pr. ár.

Hetta merkir, at undirritaðu feløg hava slakað heilar kr. 7,60 pr. ár (ella í alt kr. 15,20 yvir tvey ár), meðan arbeiðsgevarasíðan bert hevur flutt seg kr. 1,70 pr. ár (ella 3,40 yvir tvey ár).

Seinasta samráðingarroyndin í dag vísti eisini, at Føroya Arbeiðsgevarafelag ikki ynskti veruligar samráðingar, tí uttan mun til hvussu vit royndu, so vildu teir ikki førka seg eitt oyra frá tí sum teir byrjaðu við sum útspæl sítt. Teir góðu Arbeiðarafeløgunum eini kravboð í millum kr. 3,70-3,90 og var hetta ongin semingsroynd.

Um Løgtingið leggur uppí, fara vit at heita á øll fakfeløg í landinum og limir okkara kring Føroya land, um at stuðla teimum tiltøkum, sum vit fara at seta í verk.

Betri hevði verið um Landstýrið trýsti á hin partin, um at fara aftur til samráðingarborði við samráðingaranda og ikki við einum kravboðum

Vinaliga

Føroya Arbeiðarafelag

Havnar Arbeiðsmannafelag

Havnar Arbeiðskvinnufelag

Klaksvíkar Arbeiðsmannafelag

Klaksvíkar Arbeiðskvinnufelag

Framhald av síðu 6

Arbeiðarafeløgini fóru við opnum sinni á fundin. Men talan var á fundinum ikki umbeiðsgevarar, sum vóru komnir at tosa um nakað ella at royna semju. Talan vóru um eini kravboð til arbeiðarafeløgini frá FAG og tessvegna fóru partarnir aftur hvør til sítt.

Strongd alivinna
Hvørjaferð verkfall hevur verið seinnu árini, hava arbeiðarafeløgini verið løgd undir at koma alivinnuni í stóran vanda.

Her skal viðmerkjast, at arbeiðarafeløgini hava altíð víst vilja, so støðan ikki gerst hættislig. Hinvegin er sannroynd, at alarar fylla so nógv í ringarnar og at fiskurin er strongdur, verkfall ella ikki.

At fylla ringarnar á tremur gongur út yvir umhvørvið og fiskin. At nýta støðuna mótvegis arbeiðarafjøldini, sum berjist fyri rímuligari løn, er ikki sømuligt. Ein kann spyrja, hvar eftirlitið og hvat uppgávan hjá Landsdjóralæknanum er. Arbeiðarafeløgini hava víst vilja og samfelagssinni. Arbeiðarafeløgini hava ikki verið órímulig í verkfallstiltøkum, men hava hinvegin havt stóra umsiting av teim mongu undantøkunum. Arbeiðarafeløgini hava ikki sett fram órímulig krøv ella verið órímuligur samráðingarpartur, tað prógvar m.a. slakingin uppá 20 krónur, meðan arbeiðsgevararnir hinvegin bert hava flutt seg nøkur oyru og ikki vilja hoyra talan um eftirlønarprosent. Hinvegin hava arbeiðsgevararnir nú heitt á Føroya Løgting og landsstýrismyndugleikar um at leggja uppí, hóast teir áður hava sagt seg ikki velja hesa loysn, men tað hevur longi verið arbeiðarafeløgunum greitt, at jústhetta var ætlan arbeiðsgevaranna. Arbeiðarafeløgini ynskja ikki hesa loysn, men heldur eigur landsstýrismyndugleikin at fáa partarnar saman aftur til samráðingarborðið, har Semingsstovnurin aftur eigur at fara til verka.